

## Móti og mentan á Reinsaríðnum

Í kvøld skipa handlar í miðbýnum fyri mótasýning í Gamla Reinsarínum í Tórsgøtu. Handlarnir hava hesaferð lagt dent á at skapa eina størri heild kring mótasýningina, so tónleikur, mentan, hugni og góður matur eru partur av konseptinum. Mótasýningin fer at sýna tað nýggjasta innan føroysk og útlendsk konu- og mannfólkaklæði, umframt mótan innan brillur, smúkkur og hársnið. Áðrenn mótasýningin byrjar, fer Uni Debes at undirhalda við tónleiki og fyrireikararnir bjóða í samstarvi við Smyrjibreyðsbúðina eitt ábit. Uni spælir eisini í steðginum og eftir mótasýningina. Við teimum serstøku og ráu kørmunum í Reinsarínum verður talan um eitt spennandi og samansett kvøld. Hetta skuldi verið júst tað rætta fyri vinkonubólkar ella pør, sum treingja til eitt kvøld við hugna og íblástri, áðrenn jólastrevið av álvara tekur dik á seg. Luttakandi handlar og fyritøkur eru Sirri, Touché, Niels L. Arge, Kallkyn, Optikkbúðin, Klivin, Siri, Beinta Vilhelmsen Skraddarí og Royal Hárfríðkan. Tiltakið er ókeypis, og dyrnar lata upp í Reinsarínum hóskvøldið kl. 19.30. Mótasýningin, sum verður í tveimum pørtum, byrjar kl. 20.00.

# Fyrsti borgarstjórin í Vága kommunu



*Albert Ellefsen, nývaldi borgarstjórin í nýggju Vága kommunu, er kendari innan ítrótt og vinnulív enn politikk. Sjálvur metir hann hetta hava verið við til at gera góða úrslitið.*

*Mynd: Leo Poulsen*

**Nývaldi Albert Ellefsen úr Miðvági gjørdist fyrsti borgarstjórin í nýggju Vága kommunu**

KOMMUNU-POLITIKKUR

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Undan kommunuvalinum løgdu Miðvágur og Sørvágur saman, og sostatt var fyrstu ferð valt til kommunustýrið í nýggju Vága kommunu. Albert Ellefsen, sum ikki er kendur innan politiska heimin, verður fyrsti borgarstjórin.

- Eg havi einaferð fyrr verið uppstillaður til kommunuval, men tað var sum heilt ungur. Eg hevði ongan áhuga fyri tí tá, haldi eg fekk einar tvær atkvøður. Var uppstillaður fyri Fólkaflokkin til løgtingsvalið í 1994, men tað eydnaðist heldur ikki. Havi verið spurdur um at stilla upp síðan, men eg havi havt tol at bíða til nú, sigur nývaldi borgarstjórin.

Hóast flestu atkvøðurnar komu úr heimbygdini, so ivaðist hann ikki í, at hann ikki er ókendur í hinum bygdunum, nevniliga tí hann millum annað hevur verið virkin innan ítrótt har. Í familjuni stillaðu bæði eitt syskinabarn og beiggi hansara upp til hetta valið, so frá hvørjum atkvøðurnar koma, veit hann ikki at siga. Men málbólkurin av veljarum, ið kundu valt hann er stórur, tí hann er virkin innan bæði vinnulív og ítrótt.

### Vil taka avgerðir

Hann metir eina av orsøkunum til atkvøðurnar hann fekk, vera at hann vil samstarva við hinar bygdirnar. Mál sum ferðsla, skúli og trivnaður hava verið tað, ið hann hevur marknaðarført seg við.

Miðvágs og Sørvágs kommuna hava leingi samstarvað á fleiri økjum, men Albert Ellefsen metir at endaliga samanleggingin er eitt stórt stig frameftir,

- Nú fer bygdarráðið at taka neyðugar avgerðir á økjum har bara klandur hevur verið áður. Skúlin og ellisheimið eru tvey av hesum økjum. Vandin við samstarvi er at einki hendir, tí avgerðirnar verða tiknar í báðum støðum. Nú verða tær eisini felags, sigur Albert Ellefsen.

Endamálið við samanleggingini var ikki at spara, sum tað til tíðir er. Í Vága kommunu er ætlanin fyrst og fremst at hækka tænastustøðið, greiðir hann frá. Onkrar møguligar sparingar vera í rakstrinum, so meira fæst burturúr starvsfólkunum.

**FAKTA**

Albert Ellefsen býr í Miðvági, men sleit sínar barnaskógvar í Sørvági. Hann hevur akademiútbúgving í altjóða handli og marknaðarføring. Í løtuni starvast Albert Ellefsen sum umsitingarleiðari á Fiskirannsóknarstovuni.

# Samanleggingin er fyrsta avbjóðingin

*Jóhan Christiansen leggur størst dent á, at samanleggingin av Gøtu og Leirvíks kommunu nú skal fáast at rigga.*



**Samansjóðing er ovast á dagsskránni hjá Jóhan Christiansen, ið er fyrsti borgarstjórin í Eystur kommunu**

KOMMUNU-POLITIKKUR

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Frá at vera bygdaráðslimur í Leirvíkar kommunu eydnaðist tað Jóhan Christiansen at gerast borgarstjóri í nýggju Eystur kommunu, sum umfatar Leirvík og Gøtu. Ovast á dagsskrá hansara liggur samansjóðing, tí tað er umfatandi at fáa samanleggingina at rigga, greiðir hann frá.

- Tað kom eitt sindur óvart á meg at gerast borgarstjóri, men sjálvandi var hetta málið, tá eg valdi at stilla upp, sigur hann.

Hann ætlar fyrst og fremst at virka fyri at fáa samanleggina at rigga. Tað hevur nógvar fyrimunir fyri hesar kommunur at tær eru lagdar saman, tí á rakstarøkinum er nógv at spara og tí millum annað ber tli at gagnnýta stovnarnar hjá hvørjum øðrum.

- Eystur kommuna verður ein av teimum heilt sterku kommununum á fíggjarliga økinum og við at leggja vinnuøkið rætt, ber til at virka betri og at spara meira.

Eitt av málunum, sum hava verið uppi og vent í nýggju kommununi er skúlin. Hann greiðir frá, at eitt tilmæli hevur verið um at leggja skúlarnar báðar saman, eitt um at byggja ein nýggjan felagsskúla. Sjálvur ætlar hann at finna fram til eina loysn, í sátt og semju við borgararnar í báðum bygdunum.

Jóhan Christiansen er úr Leirvík, men er kortini hálvur gøtumaður. Hann hevur bechelor útbúgving í Stjórnmálafrøði og seinasta skeið sat hann í bygdaráðnum í Leirvík, og hevur eisini sitið sum stýrislimur í Føroya Kommunufelag. Í dag starvast hann á Faroe Marine Products.